| **Bólkur:**<br>Einkultfak | **Skeiðsnavn:**<br>Leiðsla og fyrisiting | **Skeiðsnummar:**<br>502 |
|---|---|---|
| **Plaserað:** 5. lestrarhálvár | **Varir:** Eitt hálvár | **ECTS:** 5 |
| **Støða:** Kravd lærugrein | **Gjørt:** 17-06-2005 | **Reviderað:** 27-09-2015 |

| | |
|---|---|
| **Endamál:** | Endamálið við fakinum er, at næmingurin lærir um leiðslu og fyriskipan. Endamálið er tískil eisini, at fyrireika komandi yvirmenn til leiklutin sum leiðarar umborð á skipi, og til tað, at gerast partur av eini fyriskipan, ið fevnir um sjálvt skipið, reiðaríið og umhvørvið: Hvussu røkir yvirmaðurin skyldu sína sum leiðari av eini manning og skipi/maskinrúmi á skilabesta hátt.<br>*Kjarnan í fakinum er:*<br>At fáa innlit í tað sosiala samspælið ímillum menniskju – eisini tá ið á stendur. Týdningurin av røttum leiðsluformi og fylgjurnar av hesum. Broytingarleiðsla, nýhugsan og týdningurin av góðum samskifti. Hvussu kann motivatión og hugburður ávirkast. Persónsmenska og menning av fólkunum.<br>At fáa innlit í, hvussu virkir og organisatiónir eru fyriskipaðar og virka, eitt nú viðv. Bygnaði, kappingarføri, kappingarføri, strategi, strategitilgongdum og verkætlanarstýring.<br>Fakið fyilgir STCW Table A-II/1, sum nevnir kjarnuførleikar og atlit hjá einum leiðara á sjónum:<br>• Evnini at leiða uppgávur og arbeiðsorku í verki<br>• Vitan og førleiki at seta í verk effektiva tilfengisumsiting<br>• Vitan og evnir at taka góðar avgerðir, ið byggja á støðu- og vandameting. Avgerðir, ið eru vegvísandi og taka hædd fyri ymsum møguleikum, árinum og avleiðingum. |
| **Høvuðsinnihald:** | Einstaklingurin og organisatiónin, Samskifti, Leiðsla og sjálvleiðsla, Organisatiónsdesign og organisatiónsformar, Mentan og etikkur, Strategi og strategitilgongdir, Broytingarleiðsla og íverksetan, Verkætlanir og verkætlanarleiðsla. |
| **Undirvísingarháttur:** | Floksundirvísing, bólkaframløgur, smærri venjingar, uppgávuinnlatingar, gestafyrilestur og/ella fyritøkuvitjan, stutt filmsbrot og alnótin. |
| **Kravdar fortreytir:** | |
| **Fortreytir góðar at hava:** | Virkisbúskapur (Skeið 501) |
| **Evaluering:** | Skrivlig próvtøka, har øll amboð eru loyvd.<br>Próvtal eftir 7-trins stiganum. |
| **Vegleiðandi undirvísingartilfar:** | Hans Jørgen Skriver, Erik Staunstrup og Peter Strom-Henningsen: Organisation, 6.udgave, 2017 ella nýggjari<br>Kopiera tilfar. |
| **Viðmerkingar:** | Fyri at sleppa til próvtøku skulu ásetingar skúlans um uppgávuavleveringar lúkast |
| **Ábyrgdari:** | IJ |